# Eiðis skúli

## Søkt verður eftir lærarum til Eiðis skúla.

- 2 lærarum í fast starv. Ynskiligt er at umsøkjari, umframt at átaka sær flokslærarauppgávu, kann undirvísa í flestu lærugreinum.
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2019/2020.Umsøkjari skal, umframt at røkja flokslærarauppgávuna í 6./7. flokki, undirvísa í donskum og enskum í grund – og miðdeild. Starvið verður sett vegna avlopstímar. Endaligur setanarbrøkur verður ásettur eftir 1.september 2019.
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2019/2020. Umsøkjari skal kunna undirvísa í støddfrøði, ítrótti og svimjing fyri dreingir. Starvið verður sett vegna niðursett tímatal. Endaligur setanarbrøkur verður ásettur eftir 1.september 2019.

**Tey, ið sett verða skulu:**

- virka eftir endamáli skúlans, ið er *trivnaður, ábyrgd og læra*
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- vera fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan
- vera stundislig og nærløgd

**Førleikakrøv:**

Læraraútbúgving.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 740470.

Umsóknir, saman við c.v. og prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 20.juni 2019 kl. 12.00. Umsóknir kunnu eisini sendast til tom.joensen@skulin.fo. Viðmerkjast skal hvat starv talan er um.

**Eiðis skúli**
**Kolsvegur 8**
**470 Eiði**

---

Eiðis skúli hevur forskúla umframt undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur. Hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Les meira um okkum á www.eidisskuli.fo